Heilsumálaráðið

# Leiðari til Talgildu Heilsuskipanina

**Talgilda heilsuskipanin (THS) verður nú skipað í eina varandi eind undir Heilsumálaráðnum. Høvuðsuppgávan er at tryggja rakstur og viðlíkahald umframt at taka lut í framhaldandi menning og verksetan av skipanini. Talan er um eitt sera vitanartungt øki og eina KT-skipan, sum víttfevnt greinar seg inn í alt heilsuverkið. Leiðarin vit leita eftir, skal kunna hava nógvar bóltar í luftini og framvegis varðveita bæði beinini á jørðini.**

**Ábyrgdarøki og uppgávur**

***Leiðsla***
- Fyrisiting og fíggjarstýring
- Stavsfólkaleiðsla av eindini
- Menning av vitan og førleikum
- Samstarv við stovnar í heilsuverkinum
- Skipan av support- og undirvísingartilgongd
- Sáttmálar við veitarar
- Luttøka í stýrisbólkum fyri verkætlanir v.m.

***Rakstur***
- Skipa og menna raksturin av THS skipanini
- Skipa og tryggja support
- Menna og dagføra dokumentatión
- Dagføra trygdarpolitikkin og hava eftirlit við hesum

***Viðlíkahald og menning***
- Samskipa rættingar og uppstigingar
- Testa nýggj modul
- Skipa arbeiðið við brúkarabólkum
- Luttaka í menningarætlanum og verkseting.

**Rætti umsøkjarin**
- Hevur viðkomandi hægri útbúgving
- Hevur holla vitan og royndir innan KT
- Dugir væl at samstarva
- Dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- Vísur myndugleika

Umsøkjarar við royndum innan leiðslu og umsiting av stórum KT-skipanum hava fyrimun.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í einum fakligt kveikjandi umhvørvi
- Eitt starv, sum tú í stóran mun myndar sjálv/ur
- Eitt arbeiðspláss har dentur er lagdur á trivnað, fakliga góðsku og góðar karmar, eisini fyri førleikamenning.

**Lønar- og setanartreytir:**
THS eindin verður skipað sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarligt og fíggjarligt øki undir Heilsumálaráðnum. Eindin er staðsett í Heilsumálaráðnum, har leiðarin vísir til aðalstjóran.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Tá talan er um nýtt starv, skal viðkomandi, ið settur verður, kunna tola broytingar í starvsinnihaldi og bygnaði.

**Nærri upplýsingar um starvið:**
Poul Geert Hansen, aðalstjóri,
Telefon: 304050,
t-postur: poul.geert.hansen@hmr.fo.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. Januar 2009 kl. 12.

Umsóknir skulu sendast til: Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, 100 Tórshavn

**Um Talgildu Heilsuskipanin**
Heilsumálaráðið hevur síðan 2005 verksett eina talgilda heilsuskipan (THS) fyri alt heilsuverkið. Tá skipanin er fult verksett, er THS vorðið nervalagið í heilsuverkinum. Allir heilsuupplýsingar hjá tí einstaka føroyinginum verða tøkir uttan mun til um ein fer til kommunulækna ella á sjúkrahús. THS er við til at tryggja høga heilsufakliga góðsku, skynsama nýtslu av tilfeingi og at tryggja eina samanhangandi sjúklingagongd.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN
TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO


# Jólamaðurin „Kjøtkrókur" ynskir øllum eini gleðilig jól




...og takkar niðanfyristandandi fyri dyggan stuðul

FØROYA BANKI · TRYGGINGARFELAGID FØROYAR · BYGMA · MBM · SKEMMAN · Atlanticpane · inn Við Landavegin · DADDAN · OPTIKBÚÐIN · Eik · sms · Eikin · fk í Hoyvík · city · PIZZA 67 · Føroya Bjór · vodafone · FØROYA TELE · NANTONG




Týsdagur 22. des.
07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Barbara Holm og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lysingar
14:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:05 Jólini nærkast
16:00 Tíðindi
16:10 Jólini nærkast
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Jólaradio úr Klaksvík
00:00 Liðugt

## Jólaradio úr Klaksvík

Týskvøldið sendir Rás2 jólaradio úr Klaksvík. Sent verður úr studio hjá Rás2, og reportarar eru eisini á ferð í býnum. Millum annað verður vitjað hjá kendum klaksvíkingi og millum fólk í býnum. Góður tónleikur verður eisini at hoyra, og onkur vinningur stendur eisini upp á spæl.

